

Uppskriftina upp á hornini hevur Judith fingið frá ein vinkonu, ið átti mammu av Viðareiði



Jastrid Olsen, økonoma, hevur starvast í køkinum á Norðoya Ellis- og Vistarheimi í mong ár. Uppskriftina upp á kleynurnar hevur hon frá ommu síni, Kathrinu í Trøllagili á Uppsølum í Klaksvík

# Kleynur úr Trøllagili og Horn av Viðareiði

*Kleynur úr Trøllagili*
*(80-100 stk)*

80-100 g av plantumargarini
370 g av sukri
4 egg
1 glas av kardamummum
3 dl av mjólk
800-1000 g av mjøl
2 pk av bakipulvur

At kóka í
1 kilo av palmini

Rør sukur, margarin og egg við lættari hond.
Koyr helvtina av mjølinum, mjólkina og kardamummurnar í.
Koyr síðani restina av mjølinum í saman við bakipulvurinum, og elt so mikið, at deiggi sleppir ílatinum.
Být deiggi í 4 partar og rulla út, til tað er um 1/2 sentimetur tjúkt.
Sker við kleynusporara og evna til kleynur.

Lat feittið koma upp á kók, og set síðani varman niður. Meðan kleynurnar kóka, má feittið ikki verða ov heitt.
Legg kleynurnar á eitt fat og stroy sukur á.

• • •

*Horn av Viðareiði* *(40 stk)*

500 g hveiti
160 g plantumargarin
60 g sukur
1 pk bakipulvur
3 dl mjólk

Fylla
1: Marsipan og nugga
2: Dadlur, sviskur ella súltutøj
3: Kanel og sukur

Elt alt tilfarið saman til deiggið sleppir ílatinum. Rulla deiggið út, til tað er um 1/2 sentimetur tjúkt. Sker í tríkantar og evna til horn.

**Vit hava vitjað á Norðoya Ellis- og Vistarheimi og hugt at, meðan Jastrid og Judith kókaðu kleynur og bakaðu horn. Kleynurnar eru so at siga feittfríar - og um tað, hornini verða fylt við, er soltið, kunnu eisini tey eta, sum ikki tola feitt**

JÓLABAKSTUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@Sivertsen*

Tað angar av jólum í køkinum á Norðoya Ellis- og Vistarheimi. Tær báðar, Jastrid Olsen og Judith á Bergi, eru í ferð við at kóka kleynur.

Onnur rullar út, meðan hin passar grýtuna. Feittið má ikki verða ov heitt og kleynurnar skulu takast upp júst í røttu løtuni.

Á einum fati liggja nýkókaðar kleynur, vælstroyddar við sukri, og í eini skál liggja horn, fylt við marsipan og nugga.

Uppskriftin upp á kleynurnar eru frá ommu Jastrid, Kathrinu í Trøllagili á Uppsølum í Klaksvík.



*Hesar leskiligu og bollutu kleynurnar úr Trøllagili eru tiltiknar góðar*

Jastrid er økonoma, og hevur starvast í køkinum á Vistarheiminum í mong ár.

Uppskriftina upp á hornini Judith fingið frá ein vinkonu, ið átti mammu av Viðareiði. Eisini Judith hevur í mong ár starvast í køkinum her. Hon sigur, at hesi hornini hevur hon bakað í 42 ár.




*Hanna og Pætur Franklin hugna sær við borðið og fegnast um, at fáa vitjan. Á Vistarheiminum er gott at búgva, og maturin er óføra góður, siga tey*



## Frítíðarskúlin í Sørvági

**søkir eftir einum deildarleiðara og einum hjálparfólki at byrja 15. januar 2004**

Frítíðarskúlin, sum er ein deild undir barnagarðinum Sýslan í Sørvági, søkir eftir einum deildarleiðara at arbeiða 35 tímar viku.

Deildarleiðarin, sum skal hava námsfrøðiligt prógv, hevur ábyrgdina av tí dagligu leiðsluni á frítíðarskúlanum.

Søkt verður eisini eftir einum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar viku.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Súsannu á Stongum, leiðara, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi seinast 1. januar 2004.

**Barnagarðurin Sýslan**
**FO-380 Sørvágur**

**Finska Aðalkonsulatið**

**Finskur tjóðardagur 6. desember**

## Stuðul

Í sambandi við, at finskur tjóðardagur var 6. desember, ber til hjá einstaklingum og feløgum at søkja um stuðul til vinnulig, mentanarlig ella ítróttarlig tiltøk ella verkætlanir. Endamálið við stuðlinum er at menna nevndu sambond millum Finland og Føroyar. Samlaði stuðulin, ið latin verður, er kr 25.000.

Umsókn saman við einari lýsing av tiltakinum/verkætlanini kann sendast til:

**Finska Aðalkonsulatið**
Hoyvíksvegur 74
100 Tórshavn

**Poul Michelsen**

## Lastbilar til sølu

Volvo FH12, 8x2 við veirheis, dumparalast við síðumatik og við HIAB 250-6 kran, ið kann takast av
Volvo F12, 8x4 við veirheis og 25 TM Palfinger krana
Volvo F12, 6x2 við veriheis og dumparalast
Volvo F10, 6x2 við veirheis og HIAB 175 krana
Volvo F10, 6x4 við vanligari last
Broyt X21 II

**Á Giljanesi Sp/f**
**Tlf. 21 98 99**

**HJÁ GUNLEIVI**

## Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læripláss leyst at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. procesteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 22 88 38 ella 31 21 61

Bátur til sølu



LOCHIN 33
Árgangur 1979
Motorur: Iveco 400 HK - 2001
Ferð: 20 mil/t
Longd: 10 m.
Breidd: 3,7 m.
Dýpd: 1,8 m.

Verður seldur um hóskandi boð fæst við ella uttan fiskiloyvi.

Áhugaði kunna ringja tlf. 221463

## Gott keyp

Honda Accord 18i. Km. 85.000. Nýsýnaður, CD-spælara o.a. Sera væl hildin, ein eigara.

Prísur kr. 99.500. Áhugað ringi

**Tlf. 543041**

## Hús í Klaksvík til sølu



**Ognin Gerðagøta 13 í Klaksvík til sølu um hóskandi boð fæst.**

Ætlar tú tær at búgva væl í miðbýnum við røttu plaseringini ella hava annað virksemi har?
Grundøkið, sum er uppá 442 $m^2$, hevur ein vakran urtagarð við girðing. Húsini í 3 hæddum, hvør umleið 68 $m^2$.
Kjallari: gongd, vaskirúm, fýrrúm, hobbyrúm, hjallur, baðirúm og stova.
Miðhædd: durur, gongd, køkur og vinkulstova.
Loft: gongd, 3 kømur, baðirúm og altanur. Alt vælhildið.

**Tlf. 314157 eftir kl. 19.00**

## Marknaðardagur

Í bygdarhúsinum í Kolla firði leygardagin 13. des. kl. 14-19 við klæðum av merkinum Try-Me og Feel Free, Friendtex og Greenhouse. Jólaprýði av perlum, eisini verða tekningar og akvarellir.

Kaffi fæst til keyps

Øll eru hjartaliga vælkomin

Sosialurin 341800

## Frá Happadráttinum

Sagt verður frá, at frá 1. januar 2004, er

**Anna Norðoy**
**Trøllagil 3**
**700 Klaksvík**
**Tlf. 457668**

sett sum happadráttarseljari í Klaksvík.

Nevndin fyri
**HIN FØROYSKA HAPPADRÁTTIN**
Gundadalsvegur 27
100 Tórshavn